LM-057/2024

**Heilsumálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 11.2.2025 |
| Mál nr.: | 24/06953-77 |
| Málsviðgjørt: | BL/GMM/RG |
| Ummælistíð: | 14.11.24-12.12.24 |
| Eftirkannað: | 19.12.2024 |

**Uppskot til**

# Løgtingslóg um afturrindan av heilsutrygdargjaldi

**§ 1.** Persónar, sum frá 1. november 2014 til og við 2023 hava goldið heilsutrygdargjald sambært § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini, og sum sama ár hava rindað heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi og tí kunnu fáa frítøku í Føroyum, vísandi til Nordisk konvention om social sikring, kunnu eftir umsókn fáa afturgoldið heilsutrygdargjald sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Frádráttur í skatti, sum umsøkjari hevur fingið umrøddu árini sambært § 154 b í skattalógini, verður drigin frá heilsutrygdargjaldi, sum sambært stk. 1 kann rindast aftur.

**§ 2.** Umsókn um at fáa afturgoldið heilsutrygdargjald, skal sendast TAKS.
*Stk. 2.* Umsøkjarin skal, saman við umsóknini, senda skjalprógv fyri, at viðkomandi hevur rindað sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi, sambært Nordisk konvention om social sikring, samstundis sum, at viðkomandi hevur rindað heilsutrygdargjald í Føroyum. Umsøkjarin skal eisini skjalprógva, um og nær hann hevur gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu sambært lov om renter ved forsinket betaling, m.v.
*Stk. 3.* Umsókn, saman við skjalprógvum, skal sendast umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS.
*Stk. 4.* TAKS kann krevja aðrar neyðugar upplýsingar til málið frá umsøkjara.

**§ 3.** Mett verður um, hvørt umsøkjari kann fáa afturgoldið heilsutrygdargjald sambært Nordisk konvention om social sikring og tilhoyrandi EØF-fyriskipanum.
*Stk. 2.* TAKS kannar, um umsøkjari hevur fingið frádrátt í skattinum, sambært §154 b í skattalógini. Um so er, verður upphæddin drigin frá, áðrenn afturrindað verður.
*Stk. 3.* TAKS roknar út, hvørja upphædd umsøkjari skal fáa afturgoldna og afturrindar umsøkjara heilsutrygdargjald.

**§ 4.** Afturgoldið verður aftur til tann 1. november 2014, tá ið Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum heimvísti einum kærumáli til nýggja støðutakan hjá Heilsutrygd.
*Stk. 2.* Er ikki greitt, hvør inntøka hoyrir til tíðarskeiðið við frítøku, verður heilsutrygdargjald, sum er goldið av skattskyldugu inntøkuni, afturrindað lutfalsliga í mun til mánaðir við frítøku, og út frá samlaðu skattskyldugu inntøkuni fyri árið.

**§ 5.** Til nýtslu í sambandi við umsókn um afturgjald av heilsutrygdargjaldi, kann TAKS útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum.

**§ 6.** Hevur persónur givið TAKS skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri afturgjald sambært hesi løgtingslóg, kann TAKS eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið umsøkjari av órøttum hevur fingið útgoldið frá TAKS.

**§ 7.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg, eru endaligar innan fyrisitingina.

**§ 8.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2026.
*Stk. 2.* Umsóknir móttiknar innan 1. januar 2026 verða avgreiddar sambært hesi løgtingslóg.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við hesum lógaruppskoti fæst greið lógarheimild til at afturrinda heilsutrygdargjald aftur í tíð til teir persónar, ið hava goldið heilsutrygdargjald sambært § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini, og sum sama ár hava rindað heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi vísandi til Nordisk konvention om social sikring.

Sambært Nordisk konvention om social sikring, hevur ein borgari ikki skyldu til at rinda til sosiala skipan í meira enn einum landi, sum er fevnt av konventiónini. Um føroyingur tí rindar og sambært konventiónini eigur at rinda til aðra sosiala skipan, sum t.d. Folketrygd í Noreg, hevur hann ikki eisini skyldu til at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum sambært konventiónini.

Hetta var í andsøgn við áðurgaldandi § 24 í heilsutrygdarlóg, sum ásetti, at øll, ið høvdu fylt 18 ár, og sum vóru fevnd av lógini, skuldu gjalda eitt ávíst gjald um mánaðin, umframt eitt ávíst prosenttal av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd. Gjaldið er nú 175 kr. um mánaðin, umframt 0,70% av skattskyldugu inntøkuni hjá viðkomandi. Hendan áseting varð broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 29. mai 2024, soleiðis at lógin frá 1. juli 2024 er í samsvari við Nordisk konvention om social sikring.

***Gongdin í málinum***
Hetta málið byrjaði við, at ein borgari í 2013 legði eitt mál fyri Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, har hann kravdi goldin heilsutrygdargjøld afturrindað, og kravdi at fáa staðfest, at hann ikki hevur skyldu at rinda heilsutrygdargjald, vísandi til Nordisk konvention om social sikring. Í november 2014 heimvísti Kærunevndin avgerðina hjá Heilsutrygd til viðgerð og til at gera av, um kærarin er fevndur av lógini í arbeiðslandinum ella bústaðarlandinum vísandi til lógargrein 14b. Talan er her um EØF-fyriskipan 883/2004 og EØF-fyriskipan 987/2009.

Í mars 2017 legði landsstýriskvinnan í heilsumálum uppskot til broyting í heilsutrygdarlógini um undantak í gjaldskylduni fyri Løgtingið (LM107/2016). Málið fekk fyrstu viðgerð í Løgtinginum og varð síðani beint í Trivnaðarnevndina. Av tí, at málið ikki kom út aftur úr Trivnaðarnevndini, fall málið burtur, tá ið tingsetan endaði.

Í 2019 var málið aftur viðgjørt í Kærunevndini. Í hesum málinum avgjørdi Kærunevndin at broyta avgerðina hjá Heilsutrygd soleiðis, at gjaldskyldan, sum er áløgd kæraranum sambært heilsutrygdarlógini § 24, stk. 1, fellur burtur.

Í avgerð sínari sigur Kærunevndin m.a.: «Tá ósamsvar er millum løgtingslóg og millumtjóða sáttmála, sum heimastýrið hevur gjørt, ásetir § 55 í stýrisskipanarlógini, at viðkomandi løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg ikki hevur gildið. Hetta merkir, at ikki ber til at handhevja løgtingslóg, sum er í stríð við altjóða sáttmála, ið heimastýrið hevur gjørt við onnur lond, ella sum Danmark hevur gjørt og sum eisini fevnir um Føroyar. Hetta merkir í hesum ítøkiliga førinum, at gjaldskyldan, sum er áløgd kærara sambært heilsutrygdarlógini § 24, stk. 1, fellur burtur, vísandi til art. 11, stk. 4 í sáttmálanum (fyriskipan 883/2004).»

Í framhaldi av hesum heitti Kærunevndin á Heilsutrygd um at viðgera spurningin um møguligt afturgjald av longu inngoldnum heilsutrygdargjaldi.

Heilsutrygd afturrindaði tó ikki persónunum heilsutrygdargjald, men vísti á, at tað er greitt ásett í § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini, at øll, ið eru búsitandi í Føroyum, skulu gjalda heilsutrygdargjald.

Heilsutrygd helt seg í hesum sambandi til løgbita 2 frá Løgmansskrivstovuni (2019), ið ljóðar m.a. soleiðis: «Tað eru ikki stjórnarráðini ella stovnar undir stjórnarráðunum, ið skulu seta til viks eina løgtingslóg, sum er í stríð við millumtjóðasáttmála sambært § 55 í stýrisskipanarlógini. Virðingin fyri eini løgtingslóg má vera stór. Tað eru fólksins umboð, sum hava samtykt hana. Skal rættast í eini lóg, má tað vera Løgtingið sjálvt, sum ger tað. Landsstýrismaðurin hevur heimild at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið at broyta lógina, soleiðis at lóggávan fer at samsvara við millumtjóðasáttmálan. Í lógaruppskotinum má vera greitt frá, hví galdandi lóggáva gongur ímóti millumtjóðasáttmálanum. Løgtingið kann so kjakast um málið og siga frá, hvørt tað er samt við landsstýrismanninum um, at lógin gongur ímóti sáttmálanum og so samtykkja at broyta lóggávuna.
...
Tað eru dómstólarnir, sum endaliga taka støðu til, hvørt løgtingslóg skal setast til viks fyri millumtjóðasáttmála sambært heimastýrislógini § 5, stk. 1 og stýrisskipanarlógini § 55, og tá gerst ikki annað hjá fyrisitingini enn at taka slíka niðurstøðu til eftirtektar.»

Málið um afturrindan av heilsutrygdargjaldi endaði í Føroya rætti á heysti 2021, har rætturin kom til ta niðurstøðu, at Heilsutrygd ikki kann krevja heilsutrygdargjald frá persónum, ið longu hava goldið eitt gjald til eina sosiala skipan í einum øðrum landi, ið er fevnt av Nordisk konvention om social sikring.

Málið var síðani lagt fyri Eystara landsrætt, sum við dómi frá 31. august 2023, kom til ta niðurstøðu, at Heilsutrygd ikki hevði rættarmálsføri at stevna borgarum, sum høvdu fingið viðhald í Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum.

Í Løgriti 3 hjá Løgmálaráðnum um støðu løgtingslóga í mun til millumtjóðarættarligar skyldur, frá januar 2025, verður mett, at grundgevingarnar hjá Føroya Rætti fyri frídøming við hesum eru strikaðar og ikki galdandi, tí at landsrætturin kemur við nýggjum grundgevingum, sum í roynd og veru strika grundgevingarnar í fyrsta instansi og bara frídøma av saksformalitetum.

Heilsutrygd søkti í 2023 Procesbevillingsnævnet um at sleppa at royna málið í Hægstarætti, og har fáa greiðu á materiella spurninginum um samanspælið millum § 55 í Stýrisskipanarlógini og gjaldskyldu sambært løgtingslóg, sum ikki er í samsvari við Nordisk konvention om social sikring. Heilsutrygd fekk tó í februar 2024 noktandi svar frá Procesbevillingsnævnet, og sleppur sostatt ikki at royna málið í Hægstarætti.

Heilsutrygdarlógin varð broytt við løgtingslóg nr. 50/2024. Lógin, ið varð sett í gildi 1. juli 2024, heimilar undantak fyri gjaldskyldu av heilsutrygdargjaldi, um persónurin kann skjalprógva, at viðkomandi hevur goldið til sosiala skipan í øðrum Norðurlandi.

Vísandi til omanfyristandandi er tað ikki heilt greitt, hvørt persónar, ið hava goldið sosialttrygdargjald í øðrum Norðurlandi, samstundis sum hesir hava rindað heilsutrygdargjald í Føroyum, hava rætt til at fáa afturrindað heilsutrygdargjald.

Landsstýrið hevur nú tikið avgerð um at áseta reglur í lóg, soleiðis at greið lógarheimild fæst fyri at afturrinda heilsutrygdargjald aftur í tíð til teir persónar, ið hava goldið heilsutrygdargjald sambært § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini, og sum sama ár hava rindað heilsutrygdargjald í

øðrum Norðurlandi, vísandi til Nordisk konvention om social sikring og tilhoyrandi EØF-fyriskipanum.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Ongin lóggáva er, ið heimilar persónum, ið hava goldið heilsutrygdargjald í Føroyum umframt gjald til sosiala skipan í einum øðrum Norðurlandi, ið er fevnt av Nordisk konvention om social sikring, at fáa hetta afturrindað aftur í tíð.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa heimild til at afturrinda persónum heilsutrygdargjald aftur í tíð, samsvarandi Nordisk konvention om social sikring og tilhoyrandi EØF-fyriskipanum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við lógaruppskotinum verður heimild fingin til at afturrinda persónum heilsutrygdargjald aftur í tíð, samsvarandi Nordisk konvention om social sikring og tilhoyrandi EØF-fyriskipanum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá Fíggjarmálaráðnum, Heilsutrygd, TAKS, Almanna- og mentamálaráðnum, Almannaverkinum, Felagnum Antares, Pam Offshore og Faroe Offshore.

Hoyringarsvar eru innkomin frá TAKS, Almannaverkinum, Heilsutrygd og Felagnum Antares.

TAKS mælir til, at kravt verður, at umsókn, saman við kravdum skjalprógvi, skal sendast umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS. Hetta kundi verið ásett í § 3, stk. 4. TAKS hevur annars ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

*Svar:*
Landsstýriskvinnan hevur tikið hesa viðmerking til eftirtektar. Nýtt stykki er sett inn sum § 2, stk. 3 í lógaruppskotinum.

Almannaverkið hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Á Heilsutrygd eru tey fegin um, at stig nú verða tikin til at loysa hetta mál. Heilsutrygd hevur ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

Felagið Antares fegnast um, at Heilsumálaráðið og landsstýrið endiliga hava tikið málið upp. Felagið hevur tó nógvar viðmerkingar til lógaruppskotið. Viðmerkingarnar í fullum líki, eru hjálagdar hesum lógaruppskoti sum fylgiskjal. Niðanfyri er samandráttur av Hoyringarsvarinum hjá Felagnum Antares.

- Yvirskipaðar viðmerkingar: Felagið er av teirri fatan, at tað er óneyðugt við lóg at geva Heilsutrygd heimild at afturrinda borgarunum tað, sum myndugleikin av órøttum hevur tikið frá borgarunum.
- Felagið er av teirri fatan, at Heilsutrygd og landsstýrið hava skyldu til at rinda heilsutrygdargjald aftur til borgarar, longur aftur í tíð enn til 2014, tvs. í øllum førum aftur til, tá ið Heilsutrygdarlógin kom í gildi 1. januar 2010. Felagið heitir á landsstýriskvinnuna um at bera so í bandi, at broyta hesa áseting, so at uppskotið ikki er tíðaravmarkað til einans at galda fyri árini 2014-2023.

- Sambært § 1, stk. 2, skal frádráttur í skatti eftir § 154b í skattalógini dragast frá útgjaldinum av heilsutrygd. Áhugafelagið Antares er av teirri fatan, at hetta undirgrevur alt lógaruppskotið. Felagið metir tað vera grundleggjandi skeivt og ein vandi fyri rættartrygdina, um Løgtingið samtykkir § 1, stk. 2 og heitir á landsstýriskvinnuna um at strika § 1, stk. 2 í lógaruppskotinum.
- Sambært § 2, stk. 3 skal umsøkjari senda inn skjalprógv fyri, at viðkomandi hevur rindað sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi. Felagið skrivar, at TAKS hevur hesar upplýsingar frá borgarunum í sjálvuppgávuni. Tað skuldi tískil ikki verið neyðugt at fingið borgararnar til at útvega hesar upplýsingar. Talan er um eitt langt tíðarskeið og verri enn so allir borgarar hava atgongd til hesar skipanir, og tískil vera summi fyri vanbýti.
- Felagið heldur tað verða átaluvert, at avgerðir um at afturrinda, tvs. sýtan av at afturrinda heilsutrygdargjald, ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.
- Felagið metir, at tað er skeivt at áseta, at lógin fer úr gildi eitt ávíst tíðspunkt.

*Svar:*
Landsstýriskvinnan hevur hesar viðmerkingar til hoyringsskrivið frá Felagnum Antares:

Sum víst á í almennu viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið, metir landsstýrið ikki, at tað er heilt greitt, hvørt persónar, ið hava goldið sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi, samstundis sum hesir hava rindað heilsutrygdargjald í Føroyum, hava rætt til at fáa afturrindað heilsutrygdargjald.

Landsstýrið hevur tí tikið avgerð um at áseta reglur í lóg, soleiðis at greið lógarheimild fæst fyri at afturrinda heilsutrygdargjald aftur í tíð til persónar, ið hava goldið heilsutrygdargjald í einum øðrum Norðurlandi, vísandi til Nordisk konvention om social sikring og tilhoyrandi EØF-fyriskipanum.

Semja er í landsstýrinum um, at rinda heilsutrygdargjald aftur í tíð til 2014, og semja er eisini í landsstýrinum um, at frádráttur í skatti eftir § 154b í skattalógini skal dragast frá útgjaldinum av heilsutrygd. Soleiðis fáa persónar ikki afturgoldið heilsutrygdargjald í tann mun, teir hava fingið frádrátt í skatti. Landsstýriskvinnan heldur seg til hesa semju. Broytingar verða tí ikki gjørdar í mun til hetta í lógaruppskotinum.

Sambært § 2, stk. 3 skal umsøkjari, saman við umsóknini, senda skjalprógv fyri, at viðkomandi hevur rindað sosialtrygdargjald í øðrum Norðurlandi. TAKS hevur ikki skjalprógv fyri, hvørt persónur hevur rindað sosialtryggingargjald í øðrum Norðurlandi. Tí má umsøkjari sjálvur senda TAKS hesar upplýsingar. Landsstýriskvinnan tekur tí ikki hesa viðmerking til eftirtektar.

Í lógaruppskotinum verður ásett, at avgerðir sambært lógini eru endaligar innan fyrisitingina. Hetta merkir, at avgerðirnar ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarmyndugleika. Sum greitt frá í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, hevur landsstýrið í hesum máli tikið avgerð um at afturrinda heilsutrygdargjald til teir persónar, ið hava rindað sosialtryggingargjald í øðrum Norðurlandi, samstundis sum at teir hava rindað heilsutrygdargjald í Føroyum. Hetta hóast tað ikki er endaliga staðfest, at hesir persónar hava rætt til afturgjald av heilsutrygdargjaldi. Landsstýriskvinnan tekur tí ikki til eftirtektar viðmerkingina um, at avgerðir sambært hesi lóg kunnu kærast.

Í lógaruppskotinum er sett inn ein sólsetursáseting í § 8, soleiðis at lógin fer úr gildi 1. januar 2026. Hetta lógaruppskotið viðførir nógva eykaumsiting fyri TAKS. Við at seta inn eina sólsetursáseting, verða øll málini avgreidd innan eitt ár. Landsstýriskvinnan tekur ikki til eftirtektar viðmerkingina um, at eingin sólsetursáseting skal vera í lógaruppskotinum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað er trupult at finna fram til, hvussu nógvar persónar talan er um. Somuleiðis er trupult at siga neyvt, hvat kostnaðurin av samlaða afturgjaldinum verður.

Tó kann sigast, at talan ikki er um tey heilsustarvsfólk og onnur, sum í styttri tíðarskeið arbeiða í t.d. Noreg. Hesi søkja vanliga Almannaverkið um frítøku fyri at rinda folketrygdegjald og fáa undantak, áðrenn tey fara úr Føroyum. Tey rinda sostatt framhaldandi heilsutrygdargjald í Føroyum, meðan tey eru uttanlands í arbeiðsørindum. Fyri fleiri í frálandavinnuni er somuleiðis galdandi, at norski arbeiðsgevarin krevur, at arbeiðstakararnir fáa frítøku fyri at rinda folketrygdegjald. Hesir søkja sostatt um at sleppa undan at rinda folketrygdegjald og fáa frítøku, áðrenn teir fara úr Føroyum. T.v.s. at hesir framhaldandi eru tryggjaðir í Føroyum og rinda heilsutrygdargjald í Føroyum, meðan teir arbeiða í Noreg.

Talan er í høvuðsheitum um persónar, ið starvast í øðrum Norðurlandi.

TAKS hevur biðið Elektron gera eina koyring yvir teir persónar, sum hava boðað TAKS frá, at teir gjalda sosial gjøld í Norðurlondum, og hvussu nógv hesir persónar hava rindað í heilsutrygdargjaldi í Føroyum. Summir persónar hava ikki boðað frá, tí teir vita, at teir ikki fáa ágóðan av frádráttinum, og summir hava lagt sosialu gjøldini saman við goldnum skatti.

Niðanfyristandandi er tí besta boð frá TAKS uppá ta upphædd, sum skal afturrindast borgarum. Viðmerkjast skal, at upphæddin er uttan frádrátt eftir § 154b í skattalógini. TAKS metir ikki, at tað ber til at meta um frádráttin eftir § 154b í skattalógini, fyrr enn tey eru farin í holt við at viðgera ítøkiligu umsóknirnar.

| Skattaár | Tal av persónum | Upphædd heilsutrygd kr. |
|---|---|---|
| 2014 | 382 | 203.499 |
| 2015 | 508 | 2.483.369 |
| 2016 | 530 | 2.677.281 |
| 2017 | 474 | 2.777.352 |
| 2018 | 434 | 2.345.506 |
| 2019 | 452 | 2.298.947 |
| 2020 | 460 | 2.423.984 |
| 2021 | 473 | 2.531.716 |
| 2022 | 470 | 2.680.676 |
| 2023 | 447 | 1.954.557 |
| Íalt | 1293 persónar | 22.376.886 |

Omanfyristandandi talva vísir, hvussu stóra upphædd í heilsutrygdargjaldi, hesir persónar hava goldið frá 2014-2023. Fyri 2014 eru tikin við inngjøld frá 1.12.2014 og frameftir. Av tí at tølini byggja á inngjøld, er endaliga reguleringin av gjaldinum fyri 2023 ikki komin við, og talið fyri 2023 eigur tí at verða hægri. Fyri øll ár skal fyrivarni eisini takast fyri, at talvan vísir goldið heilsutrygdargjald hjá øllum teimum, sum hava upplýst á sjálvuppgávu, at tey hava goldið sosial gjøld í Norðurlondum. Væntandi kunnu ikki allir persónar fáa frítøku sbrt. konventiónini, t.d. tí teir eisini hava arbeiði í Føroyum, meir enn 25%, ella tí talan kann vera um persónar, sum hava arbeitt í øðrum parti av ríkinum, og konventiónin ikki er galdandi innanhýsis í ríkinum. Tí verður upphæddin at gjalda aftur væntandi nakað lægri enn talvan vísir. Eisini tí

frádráttur eftir § 154b í skattalógini ikki er við í talvuni. Hinvegin hevur heldur ikki verið møguligt at meta um rentuna.

Umframt at TAKS má brúka umleið 7 starvsfólk til viðgerð av umsóknum, sí umsitingarligar avleiðingar, fer viðgerðin at hava nakrar fíggjarligar útreiðslur við sær fyri TAKS til samskifti, postgjald, møguligar skipanarligar tillagingar v.m. Hesar útreiðslur verða mettar til uml. 1,5 mió. kr.

Tilsamans verður tí, við fyrivarni, mettur ein samlaður kostnaður á uml. 1,5 mió. kr. umframt nýtslu av verandi starvsfólkum á TAKS.

Í tíðarskeiðinum, tá ið umsóknirnar verða avgreiddar og útgjøld eru til at endurgjalda borgarum heilsutrygdargjald, fer tað at merkja, at nettoinntøkurnar á høvuðskontu 20.52.12.7. Gjald til Heilsutrygd verða lægri.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Tá ið talan er um at afturrinda heilsutrygdargjald aftur í tíð, er neyðugt at viðgera hvørja einstaka umsókn. Tað er at kanna, um innkomnu upplýsingar eru rættar og síðani at rinda út til teir persónar, ið hava rindað heilsutrygdargjald og skulu hava gjald afturrindað.

Tað ber ikki til at seta upp eina tekniska skipan til hetta endamál. Neyðugt er at avgreiða allar umsóknirnar einsæris ella manuelt.

Fyri hvørja einstaka umsókn má meting gerast av, hvørt persónurin hevur rætt til at fáa heilsutrygdargjald afturrindað. Tað vil siga, at meting má gerast við støði í ítøkiligu arbeiðsviðurskiftunum fyri hvørt ár, herundir, hvørt persónurin hevur havt "en væsentlig del af sin beskæftigelse" í Føroyum, og um persónurin, út frá hesi meting, hevur rætt til at fáa heilsutrygdargjald afturgoldið.

Harafturat skal kannast, um persónurin hevur fingið frádrátt í sínari skattskyldugu inntøku í Føroyum fyri goldið heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi, sambært § 154b í skattalógini. Frádrátturin skal finnast fyri hvørt einstakt ár, og um frádráttur er fingin, skal hesin dragast frá tí upphædd, sum skal rindast útaftur.

Viðgerðin av umsóknum um afturrindan av heilsutrygdargjaldi, hevur fleiri lið:

- Kunningar- og samskiftistilfar skal gerast fyri at tryggja, at borgarar, sum hetta viðvíkur, fáa neyðugar upplýsingar um, hvat fyri tilfar skal sendast til TAKS, fyri at umsóknin kann viðgerast
- Skráseting av innsendum tilfari
- Málsviðgerð av innsendum tilfari og støðutakan til, um borgarin uppfyllir treytirnar sambært Nordisk konvention om social sikring, um frítøku fyri at gjalda heilsutrygdargjald í Føroyum – hetta er fyri hvørt ár
- Málsviðgerð av, hvussu skattauppgerðin í Føroyum er gjørd, um borgarin hevur fingið frádrátt/linking í goldnum skatti í Føroyum, orsakað av gjaldi til sosiala skipan í øðrum Norðurlandi – hetta er fyri hvørt ár
- Um borgarin ikki fær fult afturgjald av heilsutrygdargjaldi, skal hoyringarskriv sendast til borgaran um niðurstøðuna hjá TAKS, har tað út frá skattauppgerðini verður greitt frá, hví fult endurgjald ikki verður latið – hetta er fyri hvørt ár
- Um borgarin fær fult afturgjald av heilsutrygdargjaldi, verður fráboðan send um niðurstøðuna – hetta kann gerast undir einum fyri fleiri ár

- Um borgarin hevur sett fram krav um rentu av afturgjaldinum, skal roknast út, hvussu nógva rentu borgarin hevur rætt til og vísast skal á, hvussu komið er fram til upphæddina – hetta verður gjørt av samlaða afturgjaldinum
- Bóking og útgjald av endurgjaldinum av heilsutrygd og møguligari rentu
- Ætlanin er at skerja møguligan kærumøguleika hjá borgaranum, men avgerðir kunnu leggjast fyri rættin.

Viðgerðin skal gerast fyri 10 ár (frá 1. november 2014 til og við 2023), og talan er um 1300 ymiskar persónar.

Ein meting frá TAKS er, at hetta arbeiðið krevur uml. 7 ársverk, um hetta alt skal avgreiðast, innan alt ov langa tíð. Hetta gevur uml. 1,5 arbeiðsdag fyri hvønn persón í miðal. Viðmerkjast skal, at tað er trupult at gera neyva meting av hesum.

TAKS metir ikki, at tað er gjørligt at fara út um TAKS at finna 7 starvsfólk, ið kunnu loysa hesa uppgávu. Tískil má arbeiðsorkan takast burturav vanliga virkseminum hjá TAKS. Hetta fer helst at hava avleiðingar fyri svartíðir, tænastustøði og eftirlitsorkuna hjá stovninum annars. Afturat hesum koma so eisini avleiddar avleiðingar, sum krevja arbeiðsorku, so sum verkætlanarleiðsla og annað.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri persónar, ið hava arbeitt í einum Norðurlandi, ið er fevnt av Nordisk konvention om social sikring, og sum bæði hava goldið til sosiala skipan í landinum, har tey hava arbeitt, umframt at tey hava goldið heilsutrygdargjald. Við lógaruppskotinum fáa tey ein lógartryggjaðan rætt til at fáa heilsutrygdargjaldið afturgoldið.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið er í samsvari við Nordisk konvention om social sikring, ið ásetur, at ein persónur bert hevur skyldu til at gjalda til sosiala skipan í einum landi.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið er í samsvari við Hoyvíkssáttmálan (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), Evropeiska mannarættindasáttmálan sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sambært "bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap."

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Í § 6 í lógaruppskotinum er ásett, at hevur persónur givið TAKS skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri afturgjald sambært hesi lóg, kann TAKS eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið umsøkjari av órøttum hevur fingið útgoldið frá TAKS.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur onga áseting um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið hevur áseting um skyldur. Lógaruppskotið áleggur umsøkjara at senda inn umsókn til TAKS um afturrindan av heilsutrygdargjaldi. Umsøkjari skal eisini senda inn skjalprógv fyri, at viðkomandi hevur rindað sosialttryggingargjald í øðrum Norðurlandi sambært Nordisk konvention om social sikring, samstundis, sum viðkomandi hevur rindað heilsutrygdargjald í Føroyum. Umsøkjari skal eisini skjalprógva, um og nær hann hevur gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu sambært rentulógini.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur heimild til TAKS at krevja inn upplýsingar frá umsøkjarum og meta um, hvørt umsøkjarar hava rætt til at fáa heilsutrygdargjald afturgoldið. TAKS fær eisini heimild til at krevja inn gjald eftirfylgandi, um umsøkjari hevur givið TAKS skeivar upplýsingar ella hevur tagt um umstøður, sum hava týdning fyri afturgjaldið.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | [redacted] | Nei | Nei | [redacted] |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Sambært hesi grein kunnu persónar, sum hava goldið heilsutrygdargjald sambært § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini árini 2014 til 2023, og sum sama ár hava rindað heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi og hava rætt til frítøku frá at rinda í Føroyum, vísandi til Nordisk konvention om social sikring við tilhoyrandi EØF-fyriskipanum, eftir umsókn fáa afturgoldið heilsutrygdargjald.

Í stk. 2 verður staðfest, at frádráttur í skatti eftir § 154b í skattalógini skal dragast frá útgjaldinum av heilsutrygd. Soleiðis fáa persónar ikki afturgoldið í tann mun, teir hava fingið frádrátt í skatti.

**Til § 2**
Umsókn skal sendast til TAKS og umsøkjari skal, saman við umsóknini, senda inn skjalprógv fyri:

- At viðkomandi hevur rindað sosialtryggingargjald í øðrum Norðurlandi, sambært Nordisk konvention om social sikring

- Um viðkomandi hevur gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu sambært rentulógini.

TAKS hevur nógvar upplýsingar, men hevur ikki skjalprógv fyri, hvørt persónur hevur rindað sosialtryggingargjald í øðrum Norðurlandi, ella hvørt viðkomandi hevur gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu. Tí má umsøkjari sjálvur senda TAKS hesar upplýsingar.

Persónar hava, í sambandi við at inntøkan er uppgivin til skattingar, upplýst tíðarskeið, teir hava arbeitt uttanlands, og hvønn teir hava arbeitt fyri. TAKS metir, at í fleiri førum eru hesar upplýsingar nøktandi til at viðgera, um persónar eiga at rinda sosialtryggingargjøld í øðrum Norðurlandi og harvið hava rætt til frítøku í Føroyum. Hevur persónur lønarinntøku í Føroyum, sær TAKS eisini hetta í skipanunum. Verður mett, at upplýsingar í skipanini hjá TAKS ikki eru nøktandi til viðgerðina, so má TAKS biðja persónin um upplýsingar.

TAKS kannar harumframt, um viðkomandi hevur fingið frádrátt í skattinum, vísandi til áðurgaldandi § 154b í skattalógini. Um so er, skal TAKS draga hesa upphædd frá upphæddini, ið skal gjaldast út til viðkomandi.

TAKS kann krevja inn aðrar neyðugar upplýsingar til málið frá umsøkjara.

Avgerandi fyri, um persónurin hevur rætt til frítøku fyri at rinda sosialtryggingargjøld í Føroyum, er m.a., hvussu stóran part av einum ári, viðkomandi hevur arbeitt í øðrum Norðurlandi, og hvussu stóran part av sama ári, viðkomandi hevur arbeitt í Føroyum, og/ella hvussu stóran part av inntøkuni viðkomandi hevur frá ávikavist øðrum Norðurlandi og Føroyum; umframt at viðkomandi hevur rindað sosialtryggingargjald í øðrum Norðurlandi.

Sambært art. 4 í Nordisk konvention om social sikring, verður konventiónin víðkað til at fevna um nýtslu av EØF-fyriskipan nr. 883/2004 og EØF-fyriskipan 987/2009. Við hesum eru reglurnar í hesum EØF-fyriskipanum galdandi í Føroyum.

Ásetingar um lógarval ella "lovvalg", tvs. hvørs lands lóggáva er galdandi, eru í art. 11-16 í EØF-fyriskipan 883/2004. Tá ið støða skal takast til, hvør lóggáva er galdandi í einum ávísum máli, ásetir art. 13, at "En person, der normalt har lønnet beskæftigelse i to eller flere medlemsstater, er omfattet af: a) lovgivningen i bopælsmedlemsstaten, såfremt han udøver en væsentlig del af sin beskæftigelse i denne medlemsstat, eller såfremt han er beskæftiget i flere virksomheder eller hos arbejdsgivere, der har deres hjemsted eller bopæl i forskellige medlemsstater, eller b) lovgivningen i den medlemsstat, hvor virksomheden eller arbejdsgiveren, som beskæftiger ham, har sit hjemsted eller sin bopæl, såfremt han ikke udøver en væsentlig del af sin beskæftigelse i bopælsstaten."

Fyri at hava rætt til at fáa heilsutrygdargjaldið afturgoldið, skal ein persónur sostatt ikki hava "en væsentlig del af sin beskæftigelse" í Føroyum.

Sambært EØF-fyriskipan 987/2009, art. 14, stk. 8 og "vejledning nr. 9229 af 23/05/2013 om EF-regler om social sikring – Lovvalg" til art. 14: uddybning af art. 12 og 13, stendur m.a.: "Hvis der samlet set udøves mindre end 25 procent af aktiviteten i bopælslandet, er der som udgangspunkt ikke tale om udøvelse af en væsentlig del af aktiviteten."

Tað vil siga, at um ein persónur, sum hevur arbeitt í øðrum Norðurlandi í eitt ár, eisini hevur arbeitt 25% ella meira í Føroyum sama ár, hevur hann ikki rætt til at fáa afturgoldið heilsutrygdargjald. Arbeiðir hann minni enn 25% í Føroyum, hevur hann rætt til at fáa afturgoldið heilsutrygdargjald.

Tá ið støða skal takast til, um ein persónur hevur rætt til at fáa afturrindað heilsutrygdargjald, er neyðugt at myndugleikarnir meta um, vísandi til omanfyristandandi, um viðkomandi hevur rætt til at fáa afturrindað heilsutrygdargjald.

*Viðvíkjandi rentu*

Sambært § 3, *stk. 2* í rentulógini (Lov om renter ved forsinket betaling m.v., som sat i kraft ved anordning nr. 588 af 4. november 1982, og som senest ændret ved bekendtgørelse af 23. juli 2004), hevur ein rætt til rentur 1 mánað aftaná, at ein hevur kravt upphæddina við fráboðan um, at upphæddin verður renturoknað, um tað ikki verður goldið til tíðina.

Meginreglan er sostatt, at ein borgari hevur rætt til at fáa rentu oman á gjaldið, ið verður afturgoldið, um viðkomandi hevur gjørt vart við hetta yvir fyri rætta myndugleika.

Hetta merkir, at fyri at fáa rentu á heilsutrygdargjald, ið skal afturgjaldast, skal viðkomandi hava boðað Heilsutrygd ella TAKS frá hesum.

Tí verður ásett í lógaruppskotinum, at umsøkjari skal skjalprógva, um og nær hann hevur gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu sambært rentulógini. Hevur umsøkjari gjørt vart við, at hann hevur rætt til rentu, eigur hann at fáa afturgoldið við rentum. Hevur hann ikki gjørt vart við hetta, hevur hann ikki rætt til at fáa afturgoldið við rentum, vísandi til rentulógina.

**Til § 3**
TAKS metir um, hvørt umsøkjari hevur rætt til at fáa afturgoldið heilsutrygdargjald sambært Nordisk konvention om social sikring og tilhoyrandi ES-fyriskipanum. Taks skal viðgera, um persónar kunnu vera frítiknir at rinda í Føroyum sambært konventión um sosiala trygd. Talan er sostatt ikki um eina fría meting.

Sambært art. 4 í Nordisk konvention om social sikring verður konventiónin víðkað til at fevna um nýtslu av EØF-fyriskipan nr. 883/2004 og EØF-fyriskipan 987/2009. Við hesum eru reglurnar í hesum EØF-fyriskipanum galdandi í Føroyum.

TAKS kannar, um viðkomandi hevur fingið frádrátt í skattinum vísandi til áðurgaldandi § 154b í skattalógini. Um so er, skal TAKS trekkja hesa upphædd frá upphæddini, ið skal gjaldast út til viðkomandi.

TAKS roknar út, hvørja upphædd umsøkjari skal fáa afturgoldið í heilsutrygdargjaldi og afturrindar umsøkjara heilsutrygdargjaldið.

**Til § 4**
Endurrindað verður aftur til tann 1. november 2014. Tann 4. november 2014 heimvísti Kærunevndin í almanna- og heilsumálum avgerðina hjá Heilsutrygd til viðgerð og til at gera av, um kærari verður fevndur av lógini í arbeiðslandinum ella bústaðarlandinum, vísandi til lógargrein § 14b sambært EØF-fyriskipan 1408/71. Tá fasta heilsutrygdargjaldið verður kravt fyri heilar mánaðir, er tíðarskeiðið tí sett til 1. november 2014, soleiðis at tað ikki skal niðurroknast fyri november mánað.

Partur av heilsutrygdargjaldinum verður kravt sum prosent av skattskyldugu inntøkuni, sum er samlaða inntøkan hjá persóninum fyri eitt heilt inntøkuár. Tá frítøka ikki altíð er fyri heilt inntøkuár, og ongantíð fyri alt árið 2014, verður ásett, at um tað ikki er greitt, hvør inntøka hoyrir til frítøkutíðarskeiðið, so verður heilsutrygdargjaldið, sum er roknað av skattskyldugu inntøkuni, niðurroknað út frá mánaðunum við frítøku. Hevur persónur rætt til frítøku fyri november og desember 2014, verður afturgoldið 2 ferðir mánaðargjaldið, umframt 2/12 av heilsutrygdargjaldinum, sum er roknað av skattskyldugu inntøkuni fyri árið 2014. Spurningurin er harumframt, um viðkomandi skal mótroknast fyri frádrátt í skatti eftir § 154b í skattalógini.

**Til § 5**
Til nýtslu í sambandi við umsókn um afturgjald av heilsutrygdargjaldi, kann TAKS útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum.

**Til § 6**
Hevur persónur givið TAKS skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri afturgjald sambært hesi lóg, kann TAKS eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið umsøkjari av órøttum hevur fingið útgoldið frá TAKS.

Viðvíkjandi heimild at revsa, verður víst til í § 163 í revsilógini (løgtingslóg nr. 8/2024). Ásetingin er soljóðandi:

"**§ 163.** Tann, sum aðramáta til brúk í rættarviðurskiftum hjá tí almenna á skrift ella annan lesbaran hátt gevur óbeina váttan ella vissu um nakað, sum hann ikki hevur vitan um, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir."

**Til § 7**
Ásett verður, at avgerðir sambært hesi lóg eru endaligar innan fyrisitingina. Hetta merkir, at avgerðirnar ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarmyndugleika.

Umsøkjarin hevur tó altíð møguleika til at leggja málið fyri rættarskipanina.

**Til § 8**
Gildiskomuáseting. Ásett verður, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi tann 1. januar 2026. Umsóknir móttiknar innan 1. januar 2026 verða avgreiddar sambært hesi lóg. T.v.s. at ein persónur, ið sendir inn umsókn eftir 1. januar 2026, hevur ikki rætt til afturgjald av heilsutrygdargjaldi sambært lógini.

Heilsumálaráðið, 11. februar 2025

**Súsanna Bertholdsen**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá TAKS
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Heilsutrygd
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Áhugafelagnum Antares
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Almanna- og mentamálaráðnum